# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-So spennandi hevur tað ongantíð verið fyrr, og eg haldi fram, til tann seinasta atkvøðan er tald*
*(Hillary Clinton)*

# Nú stendur hann á gáttini

**Nú kann bara eitt óhapp forða Barrack Obama at gerast forsetavalevni í heyst**



*Barrack Obama, konan og døturnar á sigurspallinum í Des Moines í nátt*
*(Mynd: Polfoto)*

Barrack Obama og Hillary Clinton sunnu sum væntað hvør sítt uppstillingarval í nátt, hann í Oregon og hon í Kentucky. Sigurin hjá Hillary Clinton var sera greiður. Hon vann við meiri enn 30 prosentstigum, men tá skal havast í huga, at Kentucky er ein statur við einari stórari hvítari arbeiðarastætt, sum Hillary Clinton hevur havt gott tak á undir valstríðnum.

Kanningar í Kentucky avdúkaðu, at tað er ein sera breið og djúp gjógv ímillum teir demokratisku veljararnar. Tveir triðingar av teimum, sum atkvøddu fyri Hillary Clinton, søgdu bart út, at tey fara annaðhvørt at sita við hús ella at atkvøða fyri republikanaranum John McCain, um Barrack Obama verðu valevni hjá demokratiska flokkinum í heyst.

### Á gáttini

Sambært sjónvarpinum CNN hevur Barrack Obama nú tryggjað sær undirtøku frá 1.627 av teimum 3.253 valmonnunum, sum verða valdir á uppstillingarvalunum kring landið.

- Vit hava fingið meirilutan av teimum, sum amerikanska fólkið velur, og tí standa vit nú á gáttini til málið, sum er at røkka uppstillingini, segði Barrack Obama í sínari sigursrøðu, sum hann helt í Des Moines í Iowa.

Tað er ikki líkt til, at Obama kann fáa teir 2.026 valmenninar, sum eru neyðugir fyri at tryggja sær meiriluta á endaliga uppstillingarfundinum hjá demokratiska flokkinum, og tí verða tað tey sokallaðu »superumboðini«, sum skulu gera av, hvønn flokkurin skal stilla upp í heyst.

Tað ásannaði fremsti valfyrireikarin hjá Obama, David Axelrod, eisini í nátt.

- Hetta var eitt sera týðandi stig, men ikki endin, segði hann við CNN.

### Hillary heldur á

Politiskir serfrøðingar hava ávarað Barrack Obama ímóti at leypa á Hillary Clinton, tí tað kann fáa demokratiskar veljarar at venda honum bakið. Tað hevur hann tikið til eftirtektar, og í sigursrøðu síni í nátt rósti hann Hillary Clinton fyri hennara lut í amerikonskum politikki.

- Hon hevur víst dirvi og áhaldni, og hon hevur flutt mørk og broytt tað Amerika, har mínar døtur og teirra døtur skulu veksa upp. Tað takka vit henni fyri, segði Obama.

Hillary Clinton endurtók í nátt, at hon ætlar sær at halda á til tey seinastu uppstillingarvalini, sum eru tann 3. juni.

- Í kvøld hava vit vunnið ein týðandi sigur, sum eisini er ein dygg álitisváttan, segði hon í takkarrøðu síni í Kentucky.

Trý uppstillingarval eru eftir. Tey eru í Puerto Rico (55 valmenn), Montana (16 valmenn) og í South Dakota (15 valmenn).

# Edward Kennedy kanska eitt ár eftir

**Tann kendi amerikanski senatorurin hevur kanska eitt ár eftir at liva, siga læknar**

Í gjár boðaðu læknarnir í Boston frá, at tann 76 ára gamli Edward Kennedy hevur krabbamein í heilanum. Læknarnir duldu ikki fyri, at talan er um eitt sera álvarssamt slag av krabbameini. Skurðviðgerð hjálpir ikki, og tí er einki annað at gera enn at leingja lív hansara við stráluviðgerð og kemoterapi, siga læknarnir.

Tað fekk serfrøðingar at siga, at tann kendi politikarin hevur ikki langa tíð eftir at liva.

- Vit tosa um eitt 76 ára gamalt fólk, sum ikki kann lekjast við skurðviðgerð, og tí hevur viðkomandi helst minni enn eitt ár eftir at liva, sigur hjartalæknin Keith Black við tíðindastovuna AP. Aðrir serfrøðingar, sum AP hevur spurt, siga á leið tað sama.



*Edward Kennedy hevur verið senatorur í 46 ár, og so leingi hevur eingin annar sitið í Senatinum*
*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### ETA-leiðari tikin

Í einum væl skipaðum átaki eydnaðist tað í gjárkvøldið løgregluni í Fraklandi og Spania at taka fremsta leiðaran í baskiska loysingarfelagsskapinum ETA. Myndugleikarnir vóru komnir eftir, at Javier Lopez Pena fjaldi seg í franska býnum Bordeaux saman við nøkrum av sínum feløgum. Hetta vísti seg at vera rætt, og í átakinum eydnaðist tað at handtaka Javier Lopez Pena og tríggjar aðrar ETA-menn.

ETA hevur stríðst fyri baskiskum sjálvsstýri í umleið 40 ár, og hesi árini hava atsóknir hjá felagsskapinum kostað meiri enn 820 mannalív. Tann seinasta atsóknin var so seint sum í gjár, tá ein bumba brast í spanska býnum Bilbao. Eingin mansskaði var.

### Bretar byggja flogberar

Bretska stjórnin hevur samtykt, at landsins herfloti skal hava tveir nýggjar flogberar. Skipini verða 65.000 tons stór og sostatt størstu skip, sum bretski herflotin hevur havt. Hvørt skip skal hava pláss fyri 36 stríðsflogførum av slagnum F-35. Hesi flogførini eru amerikonsk og sera væl útgjørd. Gongst sum ætlað verða tey bæði skipini liðug í ávikavist 2014 og í 2016. Tey hava eisini fingið nøvn og skulu eita »Queen Elizabeth« og »Prince of Wales«.

Bretski herflotin hevur í løtuni tríggjar flogberar. Tann størsti er 20.000 tons, og tann elsti er bygdur í 1977.



*Modellmynd av nýggju flogberunum hjá bretska herflotanum*
*(Mynd: Royal Navy)*